*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini:*

# Neyvan loyvi at bora fyrr enn í 98

Jan Muller

Tað er neyvan sannlíkt, at oljufeløg kunnu fáa loyvi at bora í føroysku undirgrundini longu í næsta ár.

Í farnu viku upplýstu umboð fyri oljusamtakið AMG, Statoil, Mobil og Enterprice annars, at vórðu fyrstu loyvini til at bora á føroyskum øki klár á sumri næsta ár, so vóru tey klár til at bora móti ársenda 97.

Hetta tykist tó neyvan at bera til, skulu vit ganga eftir útsøgnunum hjá Martin Heinesen, leiðara á Oljufyrisitingini.

Hann sigur, at teir rokna við at kunnu kunngera fyrstu útbjóðingarrunduna tíðliga í 1997. So skulu oljufeløgini hava nakrar mánaðir, kanska eitt hálvt ár til at gera sítt tilfar klárt. Og tá so Oljufyrisitingin hevur fingið allar umsóknirnar, sum vónandi verða nógvar, fer OFS at brúka nakað av tíð til at kanna tilfarið og út frá tí geva loyvi. Hetta heldur Martin fer at taka nakað av tíð, so tað fer at fara tað mesta av einum ári frá tí at loyvini verða boðin út til fyrstu loyvini verða givin.

Hetta merkir, at feløgini neyvan sleppa at bora fyrr enn í 1998.

**BP bora í 99**

Herfyri hevði Sosialurin samrøðu við ein av oddamonnunum hjá BP, Tom Fyfe. Hann helt fyri, at var boðið út frá føroyskari síðu í 1997, so fóru at ganga eini tvey ár ella meira til teir fóru at bora, tey helst í 1999.

Hetta samsvarar eisini við tað, ið fleiri onnur oljufeløg hava úttalað seg um. Men hvat viðvíkur teimum trim um feløgunum í AMG bólkinum, so halda tey seg vera so mikið væl fyri, ja kanska eitt ár frammanfyri hini feløgini, soleiðis at um lisensir verða klárir í næsta ár, so verður farið at bora tá.

Tað verða best feløgini helst noydd at bíða við til í 1998.



*Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini – Fyrstu loyvini helst klár tíðliga í 98*

---



*Nevnd og tiltakslimir í Amnesty International Føroya Deild*

# Amnesty-nevndin skipað

Týskvøldið 23. apríl var aðalfundur í Amnesty International Føroya Deild.

Anna Maria Person, forkvinna, greiddi frá virkseminum felagsins seinasta árið. Limatalið øktist, og virknu limirnir gjørdust eisini fleiri.

Í mun til árini frammanundan, fylgdu deildin á altjóða aðalfundinum, ið varð hildin í Ljubljana í Slovenia.

Í 1995 kom eisini frá lærubeltið „mannarættindi" út. Heftið er ætlað framhaldsdeild fólkaskúlans, og við hesum hefti er frálærutilfar um mannarættindi nú bæði til barnaskúlan og framhaldsdeildina.

**Nevndarval**

Nevndin, ið varð vald á aðalfundinum hevur skipað seg soleiðis: Anna Maria Persson, forkvinna, Ingibjørg Berg, næstforkvinna, Páll Isholm, kassameistari, Jette Hoydal, nevndarlimur og Christian Gabrielsen, nevndarlimur.

Tiltakslimir eru Annika Jonsen og Páll Isholm.

Páll Isholm avloysir Sámal Christiansen, sum hevur verið kassameistari seinastu tvey árini.

Nevndin takkar hjartaliga fyri stuðulin seinasta ár og vónar, at hann verður líka góður í ár, so arbeiðið mannarættindunum at frama kann verða líka virkið í framtíðini.

---

# Kamartrio vitjar í Klaksvík og í Gøtu

Sunnudagin fer Tórshavnar Kamartrio at hava konsert í Klaksvík og í Gøtu.

Hetta er sama konsertin, sum var í Norðurlandahúsinum 17. apríl.

Konsertin í Klaksvík verður í býráðshøllini sunnudagin kl. 12 og kl. 15 í Gøtu kirkju.

Við í Tórshavnar Kamartrio eru Berghild Poulsen, sum syngur, Bjarni Berg, klarinett, og Árni Hansen, klaver.

---

# Landssjúkrahúsið kannast fyri 400.000 kr.

Randi Jacobsen

Landsstýrið hevur samtykt, at danska fyritøkan Dios skal gera kanningina av Landssjúkrahúsið.

Tilboðið er uppá 319.000 krónur + meirvirðisgjald, og tað verður slakar 400.000 krónur.

Samstarvsnevndin og stýrið fyri Landssjúkrahúsið tóku einmælt undir við, at henda fyritøka skal kanna Landssjúkrahúsið. Dios hevur gjørt fleiri líknandi kanningar m.a. á donskum sjúkrahúsum og heilsuverkinum annars.

Landsstýrið, sum bíðir um kanningina, hevur enn ikki havt stundir at orða arbeiðssetningin fyri kanningini. Tað, sum metast skal um, verður hvussu innanhýsis arbeiðið gongur, leiðsla, hvussu boð verða givin í húsinum o.s.v. Frágreiðingin skal ikki taka støðu til, hvat Landssjúkrahúsinum tørvar av útgerð, pengum o.t.l.

Andreas Petersen, landsstýrismaður, hevur fult álit á, at Dios fer at gera sítt arbeiði til lítar.

Fyritøkan hevur sagt seg kunna gera arbeiðið til tíðina, og tað merkir, at frágreiðingin skal vera liðug til á ólavsøku, tá nýggja sjúkrahúslógin eftir ætlan skal koma í gildi.

---


# Stanley

## v/ Norðskála



**OPNAR AFTUR**

**við nýggjum eigara**

**Í DAG** LEYGARD. 11.5. kl. 9.00

við HÓPIN AV GÓÐUM TILBOÐUM

OPIÐ til kl. 14.00

- ALLAR LEIKUR 1/2 PRÍS
- NÓGV ANNAÐ NIÐURSETT
- MÁLINGATILBOÐ
- ALGUFJERNARI
- PLANTUMARKNAÐUR
- HAVAMØBLAR
- AMBOÐ o.m.a. !

*Vælkomin leygardagin! Tey vaksnu fáa kaffi og børnini okkurt spennandi*

OPIÐ VERÐUR

Mánad.–fríggjad. 9–12 & 13–17.30

Leygardag 9–12

*Stanley*

v/ PF. Jómar

460 Norðskála · Tlf. 22270